## Býlingshús fyllir 20 ár

7. november verður Býlingshúsið millum Gilja í Hoyvík 20 ár. Opið hús verður á stovninum føðingardagin. Tvey av starvsfólkunum, sum vóru við til at lata stovnin upp, starvast enn har. Oda Debes hevði 20 ára starvsdag 1. oktober og Hildigarð Berg hevur 20 ára starvsdag 1 januar. Í samband við føðingardagin hava børnini heystframsýning, eins og møguleiki er at síggja ymsar myndir, sum eru tiknar gjøgnum árini. Á føðingardegnum verður opið hús á stovninum frá klokkan 8 til 10 og frá klokkan 15 til 17.



# Ein svartur mikudagur í Klaksvík



**Fimm fólk, sum starvast hjá Klaksvíkar kommunu, hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn, 10 fólk hava fingið ætlanarskriv um niðursetta tíð, og 2-3 fólk hava sjálvboðin bjóðað sær at fara í farloyvi. Talan er um lønarskerjingar upp á longri sikt, sum svara til einar 3-4 miljónir krónur**

FÍGGJARSTØÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað lá ein ófrættakendur dámur yvir Klaksvíkini í gjáramorgunin. Kvøldið fyri hevði býráðið samtykt fíggjarætlanina fyri 2009, har rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi skulu skerjst við umleið 17 miljónum krónum í mun til upprunaligu ætlaninar fyri 2009.

Avgerðin byggir á, at skarvast skal burtur av rakstrinum á flest møguligum økjum, og soleiðis lá eisini í luftini, tá býráðið hevði kallað øll starvsfólkini til fundar í gjáramorgunin, at fólk fóru at vera søgd úr starvi, eins og onnur noyddust at taka til takkar við niðursettari tíð.

### Dapur dagur

Tað var uppgávan hjá borgarstjóranum, Steinbjørn Ó. Jacobsen, at tosa við starvsfólkini og kunnað tey um støðuna og avgerðina hjá býráðnum.

- Dagurin í gjár var ein hin ringasti og tyngsti í lívi mínum, og eg viðgangi, at eg havi ikki sovið væl í nátt. Býráðið hevði tikið sína avgerð, og tað var mín uppgáva at bera avleiðingarnar av henni fram á fundinum.

Steinbjørn sigur, at øll starvsfólkini vóru kallaði til felags fund stundisliga klokkan 8.30, har hann greiddi frá býráðsviðtøkuni um skerjingar.

- Eg kunnaði tey um, at hetta tíverri kemur at ganga útyvir nøkur av starvsfólkunum hjá kommununi – við ætlanarskrivum um uppsøgn og í øðrum føri við ætlanarskrivi um niðursetta tíð.

Hann sigur, at eftir fundin við øll starvsfólkini, sum vardi í umleið ein hálvan tíma, vórðu boð síðan send eftir einum og einum fólki, sum skerjingarnar fara at ganga útyvir. Hesir fundir vardu til nakað út á seinnapartin.

- Eftir hesar samrøður við einstøku fólkini, var aftur høvi hjá øllum starvsfólkunum at samlast, bæði teimum, sum eru rakt av skerjingum og teimum, sum vera verandi. Síðan sluppu starvsfólkini, sum eru rakt, at vera saman einsamøll – uttan leiðslu, og at enda bjóðaði Klaksvíkar kommuna øllum til ein bita í býráðshúsunum.

Borgarstjórin sigur, at undan fundinum í gjáramorgunin, høvdu tey saman við álitisfólkum hjá kommununi tosað við avvarðandi fakfeløg, soleiðis at viðurskiftini kundu fara fram á rættan hátt.



*- Dagurin í gjár var ein av mínum ringastu, og eg viðgangi, at eg havi ikki sovið væl í nátt, sigur borgarstjórin, Steinbjørn Ó. Jacobsen*

### Eingi nøvn

Úrslitið av avgerðini hjá býráðnum og fundarvirkseminum í gjár er, at fimm fólk, sum starvast hjá Klaksvíkar kommunu, nú hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn, og 10 fólk hava fingið ætlanarskriv um niðursetta tíð. Haraftrat hava 2-3 fólk sjálvboðin sagt, at tey vilja fara í farloyvi í starvinum hjá kommununi.

Tá borgarstjórin nevnir hesi tøl, sigur hann, at hetta er umleið-tøl og sigur soleiðis umleið 5, umleið 10 og eini 2-3.

- Eg vil ikki tosa um nøvn, men kann siga, at talið av starvsfólkum í býráðshúsinum fer at minka nakað, eins og skerjingar eitt nú eru á vegadeildini.

Steinbjørn vísir á, at flestu starvsfólkini, sum hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn, hava uppsagnartíðir, sum eru millum 3 og 6 mánaðir, og hetta merkir, at eingin minking verður í talinum av starvsfólki beinanvegin.

- Vit vænta, at skerjingarnar í krónum fara at liggja um stívliga 2 miljónir í 2009, men at talið so hvørt, sum uppsagnirnar gerast effektivar, fer at liggja um einar 3-4 miljónir krónur tilsamans um árið.

Steinbjørn sigur, at býráðið gjørdi alt, sum lá í teirra makt fyri, at uppsøgnirnar skuldu gerast so fáar sum gjørligt.

- Tí gjørdu vit eisini av at bjóða fleiri fólkum niðursetta tíð heldur enn at siga uppaftur fleiri úr starvi. Fer tað at gangast betri, er jú møguleiki seinni at skrúva tíðina uppaftur seinni, leggur hann vónríkur aftrat.

### Góð starvsfólk

Borgarstjórin í Klaksvík sigur, at hann hevur alt gott at gera síni umsiting og teimum fólkum, sum arbeiða fyri kommununa úti í býnum.

- Hetta eru øll dugnalig fólk, og eg vildi ynskt, at øll kundu verið verandi, men tíverri loyva umstøðurnar hesum ikki, soleiðis sum fíggjarstøðan hjá kommununi er.

Spurdur, hvussu starvsfólkini sum heild tóku ætlanarskrivini um uppsøgn og niðursetta tíð á fundunum í gjáramorgunin, sigur hann:

- Vit gjørdu av at bera